

Tomislav Sivic var aftur hesaferð dominerandi spælarin á VB-liðnum. Aftanfyri hann sæst Ronnie Samuelsen, sum gjørdi avgerandi málið í dystinum
Mynd: Áki Hermansen

MANNFÓLKADYSTUR

Dysturin millum B36 var merktur av tøttum markeringum og nógvum nærdystum

1. deild menn:
B36 - VB 2-1 (1-0)

Undirhaldsgóðskan í dystinum í Gundadali sunnudagin ímillum B36 og VB, var ikki so høg, sum hon hevur verið seinastu tveir dystirnar, sum leiktir eru har. Kortini var talan um rættan mannfólkadyst, við tøttum markeringum og tøttum dystum um bóltarnar. Spælið kom harafturímóti ongantíð á tað støðið, sum áskoðarin hevði ynskt og væntað, tá talan var um dyst ímillum ávíkavist nummar 3 og 4 í landskappingini.

Tað var annars heimaliðið sum byrjaði betur, og tá dysturin var tríggjar minuttir gamal, var boð eftir VB verjuni. Julian Johnson breyt ígjøgnum í høgru síðu. Komin inn í brotsteigin varð hann trýstur av verjuleikara. Samstundis kom málverjin hjá VB, Bjarni Johansen, út ímóti. Allir tríggir brustu saman, men Julian fekk onkursvegna prikað bóltin fyri føturnar á Gunnari Nielsen, sum kundi skjóta í tóma málið.

B36 YVIRVÁG

Eftir málið hevði B36 yvirvág í leiki, og teir áttu eisini at havt avgjørt dystin hesa løtuna. Men illa gekst at fáa bóltin í málið. Leikararnir vóru ov óneyvir ella ov lítið avgjørdir tá tað umráddi, og tískil spurdist ikki tað burturúr, sum leikararnir og viðhaldsfólkið hjá B36 hevði vónað. Tað naskustu royndina hevði tvøráamaðurin og landsliðsleikarin hjá B36, Óli Johannesen, tá hann høgdi til uttanfyri brotsteigin hjá VB. Bólturin hevði kós móti samankomingini, men har var Bjarni eisini, og hann fekk bjargað skotinum til horna.

So við og við minkaði trýstið frá B36, og VB kom betur við í dystin. Teir fingu tamarhald á miðvøllinum, og enn einaferð var venjarin, Tomislav Sivic, stóri leikarin. Hann leikar skilagott, velur røttu loysnirnar og avleveringar falla væl næstan hvørjaferð. Men kortini spældu teir seg ikki til nógvar vandamiklar møguleikar, og leiðslumálið helt til hálvleik.

JUGOSLAVISKT MÁL

Men so heldur ikki nógv longur. Longu 8 minuttir eftir hálvleikstøðgin fingu vágbingar mál. Hetta var eitt reint jugoslaviskt mál. Tomislav dróg framvið fleiri, alt ov passivum, B36 leikarum. Tá hann bert hevði Tummas Eli Hansen og Egin Høgnesen frammanfyri seg, spældi hann framvið Tummas Eli, til ein púra leysan Velibor Kopurnovic, sum hegnisliga lyfti bóltin uppum Egin í B36 málinum.

B36 royndi at fáa tamarhald aftur á spælinum, men tað gekk striltið. Teirra spæl hekk illa saman, og miðvøllurin hevði tað trupult móti ágrýtnu VB'arunum. Men onkrir málmøguleikar spurdust kortini burturúr, uttan at hesir góvu mál.

Miðskeiðis í hálvleikinum eydnaðist tað Ronnie Samuelsen at leggja heimaliðið framum. B36 vann bóltin á miðjuni. Ronnie fekk fatur á bóltinum. Spældi Jákup á Borg, sum við neyvari avlevering spældi Ronni leysan. Ronni helt høvdið kalt, og smekkaði bóltin framvið Bjarna.

BROTSSPARKSHENDINGAR

Nú noyddust vágbingar fram at trýsta, og hetta hevði við sær málmøguleikar í báðum endum. Í tí eina førinum varð John Eystberg spældur leysur inni í brotsteiginum hjá B36. Hann vendi sær á, skuldi fara framvið Dánjal Petur Johansen, sum varð ov seinur við taklingini. John datt, men dómarin lat floytuna hava frið. Løtu seinni hendi líknandi hending í VB brotsteiginum. Julian fór ígjøgnum. Komin inn í brotsteiginum, heilt frammi við baklinjuna, ætlaði hann sær framvið mótstøðuleikaranum, sum fylgdi honum. Julian slapp framvið honum, men hesin fekk um beinini á Julian, sum fór fram eftir rommum. Brotsspark var lítið at ivast í. Ella var tað? Dómarin bríkslaði ið hvussu er ikki, og so kundu VB'arnir fara í skjótt mótálop. Teir sluppu eisini ígjøgnum verjuna hjá B36, men Egin bjargaði royndini.

Tá lítil løta var eftir av dystinum, fekk Velibor sítt næsta gula kort í dystinum, og tískil noyddist VB at spæla við 10 monnum, tað sum eftir var av dystinum. Sjálvt um teir vóru ein færri, trýstu teir B36 liðið í botn. Men at fáa mál, tað eydnaðist ikki. Tískil fekk B36 trý týdningarmikil stig, sum vóru neyðug, um teir skulu hava nakrar vónir at fylgja við "suverena" GÍ-liðnum í kappingini um oddasessin í 1. deild.

(rl)

SÍ VANN AÐRU FERÐ Á RAÐ

Sørvingar vunnu uppiborið dystin móti B68 á Toftum leygardagin

2. deild menn:
B68-SÍ 1-2 (0-0)

Aftur hetta vikuskiftið eydnaðist tað sørvingum at fáa trý stig, og harvið otað seg spakuliga uppeftir á stigatalvuni. Hesaferð stóðu toftamenn fyri skotum – á Toftum enntá.

Sjálvt um B68 hevði vindin undan í fyrra hálvleiki, vóru tað gestirnir sum høvdu greiða yvirvág í leiki. Sørvingar spældu seg eisini til onkrar líkinda møguleikar, men hesir vóru ikki nóg væl avgreiddir, og tískil spurdist einki mál burturúr 1. hálvleiki.

Seinni hálvleikur varð meira rótutur enn fyrri. Spælið var tilvildarligt, og gekk fyri tað mesta fyri seg á miðjum vølli. Tá okkurt um 20 minuttir vóru farnir, eydnaðist tað gestunum at fáa mál. Mótálop endaði við, at skjóti áleyparin Herning Simonsen (hevur verið til skips) varð spældur leysur. Hann var fyrri enn bæði verjuleikari og málverjin hjá B68, Allan Joensen, á bóltinum, og trillaði í tóma málið.

Lítla løtu seinni var aftur boð eftir B68-verjuni. Andreas Jensen fór ígjøgnum í høgru. Steðgaði á uttanfyri brotsteigin, og lyfti bóltin inn í brotsteigin, har Heri Hansen fekk fótin á, og sendi framvið Allani.

Toftamenn royndu at trýsta, fyri at minkað um úrslitið og kanska eisini javna. Men ikki fyrrenn 2 minuttir fyri leiklok fingu teir mál. Innskifti Oddmar Andreassen varð feldur inn í brotsteiginum hjá SÍ. Dómarin bríkslaði fyri brotssparkið, sum Oddmar sjálvur setti í netið. Fleiri mál komu ikki, og harvið vann SÍ sín næsta dyst á rað í landskappingini í ár, eftir at hava fingið eina stak vánaliga byrjan á árið.

Venjarin hjá SÍ, Jonhard Joensen, segði eftir dystin, at orsøkin til at liðið hevur vunnið tveir teir seinastu dystirnar, er at meira tyngd er komin í liðið. Hesaferð vóru bæði Herning Simonsen og Jón Hendriksen – báðir eru til skips stóran part av árinum – við á liðnum, og teir styrkja ógvuliga væl um, sjálvt um teir ikki hava vant tað stóra. Eisini vóru leikararnir meir uppsettir til dystin móti B68 enn teir hava verið undanfarnu dystirnar helt SÍ-venjarin.

(rl)

SORL TÁ SÍMUN PETUR KOM AFTUR Á GAMLA LAGIÐ

Fýra ferðir skoraði fyrrverandi álopsspælarin og topskjúttin hjá GÍ. Nú spælir Símun Petur Justinussen aftasti maður, men tað forðar honum ikki í at gera mál, og telist í løtuni millum bestu málskjúttarnar í landinum

1. deild menn:
B71-GÍ 1-9 (0-4)

Tá Sofus Clementsen ein tíma inn í dystin millum B71 og GÍ tók beinini undan Magna Jarnskor í einari harðari takling og varð útvístur, var tað líkasum ein myndalig kontrast til tað, sum annars gekk fyri seg á vøllinum:

GÍ tók beinini undan B71, og fallið hjá B71 var harðari enn tað hjá Magna!

Gøtumenn vóru flúgvandi í dystinum móti sandingum, sum í nógv ár hava verið kappingarneytar hjá GÍ í oddinum í føroysku 1. deildini.

Tað eru nógvir týðandi dystir spældir millum B71 og GÍ á Sandi í 90'unum, og so at siga hvørjaferð hevur GÍ verið omaná.

Hesaferð var tað nærmast ein flovislig eyðmýking av sandingum, sum góvust at spæla, tá GÍ var komið fram um við fleiri málum. Teir hugsaðu helst ikki um hvat kann henda, tá tú gevst at stríðast, og gøtumenn eru mótstøðuliðið.

Tað var ikki tað, at B71 ikki vildi vera við, tá Birgir Sondum floytaði dystin í gongd, teir komu bara skjótt við undirlutan, og longu tá 8 minuttir vóru spældir, noyddust teir at fella Rúna Justinussen í egnum brotsteigi, og so sendi liðskiparin hjá GÍ, Símun Petur Justinussen, bóltin í B71-málið til 1-0.

ØKTU EFTIR STUTTARI LØTU

Hetta var stormávaringin til tað, sum fór at fylgja. GÍ helt fram at spæla ágangandi, vóru sterkari í nærdystunum, og gjørdu sær stóran ómak í eftiransingunum kring allan vøllin. B71 virkaðu mótfalnir, og tá so GÍ var komið á odda 3-0, tá góðir 20 minuttir vóru spældir, mistu teir fullkomiliga mótið.

John Petersen gjørdi tað til 2-0, tá hann varð spældur leysur við Valdemar Nowicki. Hann var ísakaldur og sendi upp um málverjan. Magni Jarnskor fekk eisini eina fríspæling, tá hann skoraði til 3-0. Beint fyri hálvleik var tað aftur John Petersen, sum var á rætta staðnum og sendi bóltin í málið.

B71'arnir royndu hvør í sínum lagi at fáa okkurt burtur úr dystinum, men teir komu ikki til kjansir, og tað var ikki løgið, at teir vóru aftur úr við 4 málum í hálvleikinum.

Í seinna hálvleiki helt GÍ fram har teir sleptu í fyrra. Longu tá 10 minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki, høvdu teir skorað tvær ferðir, og at B71 minkaði um munin til 4-1, gjørdi ikki mun.

Ib Mohr Olsen fekk høvdið á bóltin, eftir horna og eitt sindur aftur og fram, og bólturin endaði í GÍ-málinum til 4-1. Hetta var tríggjar minuttir eftir hálvleikin, men longu fimm minuttir seinni økti GÍ.

Henning Jarnskor dróg frá egnum brotsteigi og inn á B71-hálvuna. Hann sendi út í høgra borð, har Rúni Justinussen var leysur. Rúni fór inn í brotsteigin hjá B71, og tá hann var komin til baklinjuna, sendi hann innfyri málið, har Henning var einsamallur, og so hevði vongverjin á landsliðnum bert at seta fótin á og í málið til 5-1.

SÍMUN PETUR FRAM AT SKORA

Tað bleiv 6-1 tá Magni Jarnskor tveitti eitt innkast fram við Sofusi Clementsen, Símun Petur Justinussen var komin fram við, og hann gjørdist leysur innanfyri B71-verjuna. Hann fór oman móti Nowicki, og tá málverjin kom út ímóti, sparkaði hann bóltin upp um hann og í málið.

Símun Petur fekk blóð á tonna, og fór nakrar ferðir aftfurat fram við. Hann skoraði eisini tvey tey næstu málini, báðu ferð eftir innlegg úr síðunum, sum hann stútaði í málið. Fyrst úr vinstru frá Magna og síðani úr høgru.

Innskifti Tummas Magnussen settið punktumið, tá hann setti høvdið undir eitt innlegg, og bólturin fór í B71-málið til 9-1 til GÍ.

STUTTLIGT AT FARA FRAM VIÐ

GÍ'arin, sum fekk flest mál móti B71, gjørdist eingin annar enn aftasti maðurin á liðnum (har skuldi hann ið hvussu er spæla). Símun Petur Justinussen er fyrrverandi áleypari og topskjútti (besti málskjútti í 1, deild í 1992), og hann kom aftur á lagið á Sandi sunnudagin, tá hann nakar ferðir í seinna hálvleiki fór fram við.

– Eg spæli aftasti maður og havi fyrst og fremst ábyrgd í verjupartinum, men eg plagi eisini at gera nakrar túrar fram á vøllin um møguleiki er til tað segði GÍ-liðskiparin við Ítróttarsosialin eftir dystin, sum ein frágreiðing uppá hví tað var hann, sum var topskjúttin í dystinum.

Er tað gott at hava eina fortíð sum áleypari, tá tú skalt fram í álop?

– Tað er tað avgjørt. Tá tú einaferð hevur spælt sum áleypari, dugir tú nakað av tí, sum skal til fyri at gera mál, og tað kom mær eisini til hjálpar í dag.

Droymir tú nú um at verða fluttur fram aftur í álopið?

– Nei, tað geri eg als ikki. Nú dámar mær nógv betri at spæla sweepari enn har frammi.. Eg eri við í meira, og so kann eg altíð gera onkrar túrar fram.

Tit liggja væl a odda í 1. deild nú. Kenna tit tykkum vísar í at fáa FM-heitið í hús?

– Nei, tað gera vit ikki. Tað eru bara fýra stig niður til næstfremsta liðið, so tað skulu bara tey tap til, so eru vit ikki fremstir longur. Tað hevur fyrr víst seg, at lið sum liggja langt á odda, snáva, tá ligið er nakað út á kappingina, men tað mugu vit fyribyrgja.

Er hetta nakað sum tit hugsa um?

– Tað kann altíð koma fyri, at eitt lið fær ein niðurtúr, men tað er ikki nakað, sum vit ganga og hugsa um í tí dagliga.

Í Gøtu stendur væl til við fólkið í ár, og tí mugu vónirnar til at endurvinna FM-heitið vera til staðar.

Janus Rasmussen er komin heimaftur, og tá Erland Tvørfoss og Alvi Justinussen fara til Danmarkar eftir summarsteðgin, eru avloysarnir klárir.

(ek)

Sámal Joensen hjá GÍ og Marek Vierzbicki hjá B71 stríðast um bóltin. Sámal og GÍ vóru væl og virðiliga omaná eftir teir 90 minuttirnar. Tapið var tað størsta hjá B71 í 1. deild nakrantíð
Mynd: Emil Simonsen



GÓÐA GONGDIN HELDUR FRAM

Í seinna hálvleiki hevði EB/Streymur geriða yvirvág og møguleikarnir trutu ikki. Teir skoraðu tríggjar ferðir og vunnu

2. deild menn:
EB/Str.-Sumba 3-1 (0-1)

Samansetta liðið úr Sundalagnum má sigast at hava fingið eina ynskibyrjan á kappingarárið. Leygardagin vunnu teir sannførandi á heimavølli ímóti Sumba, sum liggur á aftasta plássi í 2. deild við einum stigi.

Líkindini at leika fótbólt í Streymnesi legardagin vóru vánalig.

Serliga í 1. hálvleiki var nógvur vindur og harvið lítið skipað spæl. Tað vóru annars gestirnir sum høvdu vindin undan. Hetta gjørdi sítt til, at heimaliðið til tíðir í 1. hálvleiki var undir trýsti.

Sumbingar høvdu kortini torført at spæla seg ígjøgnum tøttu verjuna hjá EB/Streymi. Tískil royndu teir seg fyri tað mesta við langskotum, sum, væl hjálpt av vindinum, kundu givið okkurt málið. Men antin bjargaði Karsten Vang skotunum ella fóru royndurnar framvið málinum. Miðskeiðis í hálvleikinum eydnaðist tað gestunum at skorað. Marlon Kjærbo smekkaði horna væl innfyri málið hjá EB/Streymi. Karten megnaði ikki at halda bóltinum, sum smeyg sær inn um mállinjuna.

Var 1. hálvleikur javnur, hevði heimliðið greiða leikliga yvirvág í seinna. Og tá 10 minuttir vóru farnir, javnaðu teir. Dánjal Magnussen var fyrstur á returbólti, eftir at málverjin hjá Sumba, Fróði Mortensen (stóð væl) hevði hálvbjargað langskotið frá Briani Jensen.

Løtu seinni økti Finnbjørn Zachariassen, tá hann smekkaði fríspark uttanfyri brotsteigin í vinstru beinleiðis í netið. Stóra trýstið á málið hjá Sumba átti at givið fleiri mál, tí málmøgu eikarnir trutu ikki. Eftir leiðslumálið hjá Finnbjørn, var Sonni Samulesen tvær ferðir leysur við málverjanum hjá Sumba. Fyrru ferðina bjargaði Fróði og seinnu ferðina fór skotið uppum málið.

Stutt fyri leiklok slóg Brian Kristensen sigurin fastan. Jákup Martin Joensen vann bóltin av Sumba leikara, og stakk fram til Brian. Hann lyfti bóltin hegnisliga uppum Fróða, sum var á veg útímóti. Og so var 3-1, og enn ein sigur var í hús.

(rl)